**NSÍ-HB 2-2(0-1)**

0-1 Rógvi Jacobsen 40.
1-1 Andy Olsen 81.
1-2 Heðin á Lakjuni 82.
2-2 Andy Olsen 88.

**NSÍ:**
Jens Martin Knudsen - Brynjólvur Nielsen, Johan Troest Davidsen, Óli Hansen , Sjúrður Jacobsen(Einar Hansen 83.) - Kári Hansen, Jústines Hansen (Ian Højgaard 46.), Gert Langgaard - Andy Olsen(Debes Danielsen 89.), Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen

**HB:**
Kaj Leo Johannesen - Hallur Danielsen, Jan Dam(Rasmus Nolsøe 55.), Símun Eliasen, Janus Joensen - Rókur Jespersen, Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Heðin á Lakjuni - Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen
Dómari: Birgir Sondum
Gul kort: Andy Olsen - Kári Nielsen, Rúni Nolsøe

**Reytt kort:**
Johan Troest Davidsen

# Gullklæddir havnarmenn í Runavík

**Føroyameistararnir úr HB høvdu funnið sær gullskógvarnar frá teimum báðum undanfarnu árunum fram úr skápinum, og høvdu stroytt seg við gulli yvir tað heila, tá ið teir vitjaðu í Runavík leygardagin og saman við NSÍ settu punktum fyri kappingarárinum.**

GULLVEITSLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tveir gyltir mans: Janus Joensen og Heðin á Lakjuni taka ímóti gullkrónum*
*mynd: Álvur Haraldsen*

Tað glitraði á vøllinum í Runavík leygrdagin, tá ið NSÍ og HB spældu seinasta dystin á árinum. Leikararnir hjá HB høvdu gull í hárinum, á kjálkunum og eftir øllum búnanum.

### Lítil ferð á

Fyrstu løtuna av dystinum tóktist tað eisini sum um, at tað einasta spælararnir á vøllinum hugsaðu um var at fáa dystin avgreiddan, og harvið takka fyri árið í ár. HB var føroyameistari undan dystinum, og NSÍ hevði sum so heldur ikki nakað at spæla fyri.

Á HB-liðnum var stuttligt at síggja gomlu kempuna, Kaj Leo Johannesen, aftur standa millum stengurnar, nú Bárður Johannesen var leikbannaður, og Pól N. Joensen ikki var førur fyri at spæla. Sambandsformaðurin vísti eitt sindur av sínum gomlu kynstrum, og hann skal ikki lastast fyri nakað av málunum hjá runavíkingum.



*HB føroyarameistarar, steypavinnarar og atlantsmeistarar 2004: ovast frá vinstru: Sigurd Hansen, liðleiðari, Sámal Hansen málmansvenjari, Eli Thorsteinsson, Páll M. Joensen, Rógvi Jacobsen, Vagnur Mohr Mortensen, Símun Eliasen, Heine Fernandez venjari, Danny Rasmussen, Emil N. Leifsson, Hallur Danielsen, Hans á Lag og Oddbjørn Joensen, hjálparvenjari. Húkandi frá vinstru: Kári Nielsen, Janus Joensen, Rókur av Fløtum Jespersen, Rasmus Nolsøe, Jákup á Borg, Heðin á Lakjuni, Pól Næss Joensen, Bárður Johannesen, Jan Dam, Rúni Nolsøe og Hendrik Rubeksen.*
*mynd: Álvur Haraldsen*


## FM í virkisfótbólti 2004

Høvuðsstuðul
FARODANE

Skipað verður fyri FM-kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 16. oktober frá uml. kl. 9 til uml. kl. 18.

**Nakrar reglur fyri kappingina**
- Spælt verður á hálvum vølli
- Hvør dystur er 10 minuttir
- 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
- Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í 1., 2., 3. deild ella í steypakappingini hjá FSF í ár
- Seinasta freist at boða frá luttøku er hósdagin 7. okt.
- Luttøkugjaldið er 600,- kr. fyri hvørt lið
- Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-piltum 2005

Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

SISERO

Navn á liði/liðum
Arbeiðspláss
Kontaktfólk
Tel/e-mail

FM í virkisfótbólti 2004 • Faxa seðilin til B36 • Fax nr. 31 80 36


# Skuffandi ár

**Ein tann týdningarmiklasti leikarin á liðnum hjá NSÍ, Helgi L. Petersen, hevur enn ikki tikið støðu til, um hann fer at spæla fótbólt aftur komandi ár**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Helgi L. Petersen hevur í mong ár verið ein tann vandamiklasti áleyparin í føroyskum fótbólti og við undantaki av ár 2000, hevur Helgi leikt øll árini í barndómsfelagnum NSÍ. Nú er nógv, sum bendir á, at Helgi kanska ikki fer at spæla fótbólt komandi kappingarár.

### Skúlin krevur nógv

Tá ið vit hitta Helga beint eftir dystin móti føroyameistarunum úr HB í Runavík leygardagin, stendur hann eitt sindur burtur frá og eygleiðir rúgvuna av ovurfegnum HB-viðhaldsfólkum og leikarum, sum gera klárt til at taka ímóti gullinum.

– Hetta hevur verið eitt vánaligt ár hjá okkum. Vit eiga at kunna vinna heiðursmerkir, men í ár hevur tað ikki gingið nóg væl. Vit hava verið alt ov óstøðugir, og tað er øgiliga skuffandi, sigur Helgi. Rituvíkingurin leggur afturat, at tá ið tað er sagt, so skal eisini skoytast uppí, at HB hevur verið so nógv, nógv tað besta liðið í Føroyum í ár, og føroyameistaraheitið hjá teimum er so fult uppiborið.

Um sjálvan dystin leygardagin sigur Helgi, at fyrsta løtan í dystinum var vánalig, men so líðandi vaknaði dysturin. – Tað sást allarhelst eisini, at hvørki av liðunum hevði nakað serligt at spæla fyri. Hetta gjørdi, at bæði liðini spældu rættiliga frítt, og tað kann skapa ein góðan dyst, sigur hann.

– Tá ið vit so verða skerdir til 10 mans, fara allar spælaskipanir og avtalur annars fyri borð, og so verður bara spælt eftir fríum fantasi, og tað eydnast so okkum at koma afturíaftur tvær ferðir, og tað er ikki so galið, heldur Helgi L. Petersen.

Spurdur um hann hevur gjørt nýggja avtalu við NSÍ fyri komandi kappingarár, sigur Helgi L. Petersen, at hann enn ikki hevur gjørt av, um hann fer at spæla fótbólt komandi ár. – Nú eri eg farin undir skúla aftur, og tað krevur øgiliga nógv, so eg ivist í, um eg skal lata verða við at spæla komandi ár, sigur hann.





*Rúni Nolsøe, liðformaður hjá HB, kann fyri fjórðu ferð í sínari HB-tíð taka ímóti steypinum sum prógv um, at HB er føroyameistari.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Blandaðar kenslur

**Dysturin í Runavík leygardagin var fyribils seinasti dysturin hjá Rógva Jacobsen í reyðu og svørtu strípunum hjá HB, sum í komandi mánað fer til Íslands, har hann skal spæla við sigursvanda KR úr Reykjavík.**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Við tólv málum í landskappingini gjørdist Rógvi Jacobsen toppskjútti hjá føroyameistarunum úr HB. Komandi kappingarár skal havnarliðið hava nýggjan toppskjútta, tí Rógvi skal næstu tvey árini spæla við íslendska KR.

### Fari at sakna liðið

Rógvi Jacobsen segði eftir dystin, at tað var við ikki sørt av blandaðum kenslum, at hann tók ímóti gullheiðursmerki, tí hetta var samstundis seinasti dysturin hjá honum í HB fyribils.

– Eg fari at sakna liðið ómetaliga nógv, tí vit hava havt eitt serstakliga gott samanhald. Vit hava ikki bara verið savnaðir til venjing, tí vit hava gjørt øll møgulig onnur ting saman, sigur hann.

Í farnu viku var Rógvi sjálvur í Íslandi og hugdi at umstøðunum í KR, og hann letur bara heilt væl at. Í fyrstu atløgu verður tað bara fótbóltur á skránni, men gerast dagarnir ov langir, kann væl verða at fara at arbeiða eisini, sigur Rógvi Jacobsen, ið er útbúgvin timburmaður.

Tá ið vit spyrja Rógva, um dysturin móti NSÍ leygardagin bara var ein slíkur dystur, ið skuldi avgreiðast, svarar hann avgjørdur, at tað var tað ikki, tí teir vildu veruliga vinna dystin.

– Eg haldi ikki, at byrjanin av dystinum var nakað serligt, men aftan á fyrsta málið, kom meiri lív í dystin, og eg haldi, at vit høvdu yvirvág, men vit brendu ov nógvar kjansir, sigur hann.

Spurdur um tað verður stórur saknur í Rógva Jacobsen í HB komandi kappingarár, sigur høvuðspersónurin sjálvur, at tað væntar hann avgjørt ikki. – HB hevur so ótrúliga nógv gott ungt fólk, sum er klárt til at taka yvir, so eg beri ongan ótta fyri komandi kappingarári, sigur Rógvi Jacobsen at enda.



*Rógvi Jacobsen spældi leygardagin sín fyribils seinasta dyst fyri HB, og nú gongur leiðin hjá landsliðsleikaranum til Íslands, har hann næstu tvey árini skal spæla við KR.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*


